# Softwareútviklari/ forritari

Auxilior Technology søkir eftir softwareútviklara til at menna forrit, sum venda sær til orðblind og rørðslutarnað við t.d. sclerose, lock-in syndromi, vøddasvinni o.a. Tað snýr seg um at finna loysnir innan alternativa kommunikatión, nýtslu av PC og »Smarthouse« tøknifrøði.

Tú skalt arbeiða við forritan av Windows, Pocket-pc, talusyntesu, taluendurkenning, smarthouse- og fjarstýringseindum, net, internet og nógvum øðrum. Í starvinum upplivir tú at brúkarin er í centrum, av tí at tey eru bundin av teimum loysnum tú kemur við.

Førleikakrøv:
Tú skalt vera útbúgvin (gjarna nýútbúgvin) datamatikari, datalogur ella verkfrøðingur við sergrein í kunningartøkni. Tú skalt hava royndir innan flestu av fylgjandi umráðum: C++, Delphi, Java, .NET, UML, XML, Internet, net og Win32 forritan.
Tú skalt hava samstarvsevni, kunna arbeiða sjálvstøðugt og duga at motivera teg sjálvan til at gjøgnumføra tínar uppgávur.

Auxilior Technology hevur bústað í Trongisvági og tað krevst, at tú býrt í Føroyum. Um tú ert áhugaður, men býr uttan fyri Føroyar, kann Auxilior hjálpa til í sambandi við flyting, bústaðarmøguleikar og at finna starv til møguligan hjúnafelaga. Fólk við rætta førleikanum, sum búgva ella vilja búgva í Suðuroy, hava fyrimun.

Starvið verður sett sum skjótast, umsóknarfreistin er 7. februar og skrivlig umsókn við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skal sendast til:

**Auxilior Technology P/F**
Fo- 826 Trongisvágur
Føroyar
Tlf. 372470
e-mail: info@auxilior.com
www.auxilior.com

# Stór sethús til sølu



Húsini í Onnugøtu 3, Tórshavn, eru til sølu. Gólvvíddin er 179 m2 (íalt í einari hædd), umframt eitt lægri loft, sum er 59m2.

Í húsunum er stórur køkur við komfýri, bakarovni og kuldaskápi, grovkøkur við komfýri, uppvaskimaskinu og vaski. Loftið í køkinum og stovuni ganga upp í tróðri. Tvey kømur eru umframt hjúnarrúm, stórt baðiverilsi við saunarúmi og eitt wc við brúsu og vaski. Fýrrúm við arbeiðsborði og hjallur við frystiboks.

Hiti er í køksgólvinum, gólvinum í grovkøkinum og í baðiverislinum.

Grundøkið er slætt við góðum parkeringsviðurskiftum, og húsini eru lætt atkomilig.

Húsini kunnu síggjast eftir nærri avtalu. Ringið

**Tlf. 225429 ella 448001**

**Fiskimálaráðið**
*Fiskiveiðieftirlitið*

# Ófulltikin dekkari

Søkt verður eftir ófulltiknum dekkara.

Arbeiðið umfatar at ganga vakt og annars vanligt deksarbeiði.

Setanartreytir og løn eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Setanarøkið er Fiskimálaráðið og stovnar undir tí. Tænastustaðurin er í løtuni Fiskiveiðieftirlitið, Vaktar og Bjargingartænastan.

Setanin er avmarkað til tvey ár.

Skrivligar umsóknir, saman við avriti av møguligum prógvum og viðmælum, skulu vera Fiskiveiðieftirlitinum í hendi í seinasta lagi hósdagin 6. februar 2003 kl. 1200.

Umsóknir skulu sendast til:

**Fiskimálaráðið**
Att.: Fiskiveiðieftirlitið
Postsmoga 347
110 Tórshavn

## Frá Norðstreymoyar Fólkafloksfelag

Limafundur verður í Bygdahúsinum í Kollafirði mikukvøldið kl. 20.00.

Anfinn Kallsberg, løgmaður og Bjarni Djurholm, landsstýrismaður luttaka á fundinum.

Nýggir limur kunnu tekna seg.

**Formaðurin**

# Bókhald

Til eitt virki í Tórshavn verður søkt eftir einum fólki til bókhalds- og skrivstovuarbeiði.

Tann, ið setast skal í starvið, má hava góðan kunnleika til bókhald og kunna arbeiða sjálvstøðugt.

Kunnleiki til enskt mál er neyðugur.

Løn sambært avtalu.

Starvið skal setast skjótast gjørligt. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 1. februar 2003.

**RASMUSSEN & WEIHE**
Statsautoriserað grannskoðarafelag P/F
**An associated firm of** PricewaterhouseCoopers

Á Glaðsheyggi
P.O. Box 30
FO-110 Tórshavn
Tlf. (+298) 311017
Fax (+298) 311018
e-mail: rasmussen@rasmussen.fo
www.rasmussen.fo




<ph_1>

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!



ALMANNASTOVAN

# Avloysarar fyri sosialráðgevar

Søkt verður eftir avloysarum fyri 2 sosialráðgevar í farloyvi á økisdeildini í Havn. Størvini eru leys ávíkavist í tíðini 01/02-31/05-03 og 15/02-15/08-03. Bæði størvini er við 3/4 arbeiðstíð.

**Um deildina**
Á økisdeildini í Havn arbeiða 12 fólk.

Arbeiðs- og ábyrgdarøki hjá deildini er at:
- ráðgeva og vegleiða borgarum um rættindi og skyldur í sambandi við almannaspurningar
- seta í verk fyriskipanir sambært almannalógávuna
- í serligum førum vísa til landsumfatandi eindirnar hjá Almannastovuni

Økið hjá deildini er Streymoy, Nólsoy, Vágar, Mykines, Sandoy, Hestur og Skúvoy.

Tær sosialu fyriskipanirnar, ið økisdeildin serliga tekur sær av eru
- ymiskar fyriskipanir sambært forsorgarlógini, sum landsumfatandi eindirnar hjá Almannastovuni ikki hava ábyrgdina av
- persónliga viðbót til pensiónistar sambært pensiónslógini
- samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima
- tilráðingar í smb. við umsóknir um fyritíðarpensjónir

**Útbúgvingarkrøv og royndir**
- sosialráðgevaraútbúgving
- royndir innan almenna fyrisiting
- góður kunnleiki til EDV á brúkarastøði
- góður málburður í føroyskum, bæði munnliga og skrivliga

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Setanar- og lønarviðurskifti eru sambært sáttmálan millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Eyðvør Mortensen, deildarleiðara á tlf. 353510.

Umsóknir við avriti av prógvum o.ø. skulu vera Almannastovuni, postsmoga 3096, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 30.01.03.

# Umboðsmannaval

Sambært grein 28 í høvuðssamtyktini verður lýst til Umboðsmannaval hósdagin 13. februar 2003.

Veljast skulu 3 umboð fyri Eiði.

Uppskot skulu verða sjúkrakassanum í hendi 30. januar 2003.

**Eiðis Læknadømis Sjúkrakassi**
430 Hvalvík

veitst tú ikki tað?

**Føroya Sjómansskúli**
Maritime College

## Skeiðsdeildin

Skeiðsdeild Føroya Sjómansskúla skipar fyri eftirútbúgving av sjómonnum

Skeiðsætlan fyri 1. hálvár 2003

| | | | |
|---|---|---|---|
| ***ARPA*** | | | |
| Byrjar 3. februar | 5 dagar | kr. 7.000 | |
| Byrjar 7. apríl | 5 dagar | kr. 7.000 | |
| ***GOC (generelt certifikat sum radiooperatørur)*** | | | |
| | 15 dagar | kr.10.900 | |
| ***GMDSS-endurnýggjan*** | | | |
| Byrjar 10. mars | 5 dagar | kr. 5.900 | |
| ***LRC-radioskeið*** | | | |
| Byrjar 24. februar | 8 dagar | kr. 6.500 | |
| Byrjar 28. apríl | 8 dagar | kr. 6.500 | |
| ***LRC-radioskeið við INMARSAT*** | | | |
| Byrjar 24. februar | 8 dagar | kr. 7.500 | |
| Byrjar 28. apríl | 8 dagar | kr. 7.500 | |
| ***Olju-, gass- og kem. 1. partur (Tanker Safety)*** | | | |
| Byrjar 3. februar | 5 dagar | kr. 5.200 | |
| ***Flutningur av vandamiklum evnum*** | | | |
| Byrjar 10. februar | 4 dagar | kr. 4.200 | |
| ***Arbeiðsumhvørvi (§ 16)*** | | | |
| Byrjar 17. mars | 3 dagar | kr. 4.200 | |
| ***Tilbúgving §§ 4,7 og 8 (Nutec)*** | | | |
| Byrjar 10. mars | 3 dagar | kr. 5.500 | |

Øll skeiðini eru dagskeið og undirvísingin fer fram á skúlanum. Skúlin hevur møguleika at skipa fyri øðrum skeiðum, umframt nevndu skeiðum til aðrar tíðir.
Meiri fæst at vita við at seta seg í samband við skeiðsdeild skúlans.

Tilmelding á tel 35 75 16 ella sg@farnav.fo
Eisini ber til at fara inn á heimasíðu skúlans og melda til: www.farnav.fo

*Útbúgvingarnar á Føroya Sjómansskúla eru góðkendar av Føroya Landsstýri, Søfartsstyrelsen og IMO*

Nóatún 2
Postboks 104
FO-110 Tórshavn
Føroyar
Tel +298 357500
Fax +298 357502
farnav@farnav.fo
www.farnav.fo

# Frá Leirvíkar Arbeiðsmannafelag

Ársaðalfundur Leirvíkar Arbeiðsmannafelag verður 19. februar 2003.

Tíð og stað verður kunngjørt seinni.

Dagsskrá sambært lógum felagsins.

Uppskot til ársaðalfundin skal vera nevndarformanninum í hendi í seinasta lagi 6. februar 2003.

**Nevndin**

# Frá Føroya Psoriasisfelag

Vit vilja hervið boða frá at komandi viðgerðartúrur til Bláa Lónið verður 13. apríl til 9. mai 2003. Tey, ið hava tørv á viðgerð verða biðin um at fara til egnan kommunulækna. Læknin fyllir umsóknarblað út og sendir tað til húðlæknan.

Umsóknin skal latast inn í seinasta lagi 1. februar 2003.

Um ivaspurningar eru hesum viðvíkjandi eru tit vælkomin at ringja á tlf. 424 179.